Eg var bundin av barnaporno. Tað var
vaksandi tørvur, ið fekk meg at taka r
og meira barnaporno niður á teldun

# TÁ IÐ ÁGANGURIN FERÐAST KRING HEIMIN

## – UM MYNDIR AV KYNSLIGUM ÁGANGI MÓTI BØRNUM OG UNGUM

2019



KRIS | RÁÐGEVING FYRI SEKSUELT MISBRÚKT

Red Barnet

# INNIHALD





## Meldið myndir og ólógligar heimasíður!


**6** Einaferð offur – altíð offur

**8** At flokka myndir eftir innihaldi

**10** 150 skuldsetingar um árið

**10** Ein ørgrynna av skemmandi myndum í gráum øki

**12** Lógin

**13** Ágangur ímóti uppspunnum børnum er lógligur

**14** Talgild framleiðsla er skelkandi einføld

**15** Felagsskapurin aftan fyri myndirnar

**16** Savnarasjúka

**16** Vandin við at vísa seg fram

**16** Atgongd gjøgnum loynilig leinki

**17** Eingir skemmarar eru líka

**17** Viðgerðartilboð fyri skemmarar í Danmark

**18** Melda myndir á teldu

**18** Melda ólógligar heimasíður

**19** Talgilt samstarv í Danmark

**19** Talgilt fingramerki hjálpir løgregluni

**19** Ólógligar myndir á arbeiðsplássinum


> At enda brúkti eg næstan 4 tímar um dagin til at leita eftir barnaporno á alnetinum. Serliga leitaði eg eftir tilfari við kvinnum saman við børnum. Eg var avgjørt bundin av netporno.

Red Barnet er danska deildin hjá Save the Children – heimsins største óhefta barnarættindafelagsskapi. Red Barnet stríðist fyri rættindum hjá børnum og veitir børnum og ungum í vandabólkum bæði í Danmark og úti í heimi bráðfeingis- og langtíðarhjálp.


**Tekstur:** Betina Rangstrup
**Ritstjórn:** Kuno Sørensen, Gitte Jacobsen, Karianne Blem og Majken Søndergaard Nielsen
**Myndir:** : Mette Frandsen
**Snið og framleiðsla:** Westring kbh

**Útgevari: Red Barnet 2013**
**Dagførd útgáva:** 2015
**Føroysk útgáva:** KRIS, 2019
**Málslig viðgerð:** Sprotin
**Prentumsiting:** Sprotin
**Stuðlað:** Jólamerkjagrunnurin
**Høvuðsstuðul:** BankNordik

**Red Barnet**
Rosenørns Allé 12
1634 København V
Telefon 3536 5555
redbarnet@redbarnet.dk
www.redbarnet.dk

ISBN 978-99972-1-351-8

# NÓGV MEIRA ENN MYNDIR

So hvørt sum alnetið hevur fingið ein alsamt vaksandi leiklut í gerandisdegnum kring allan heim, er nøgdin av myndum av kynsligum ágangi móti børnum – ofta nevnt barnapornografi – eisini vaksin ómetaliga nógv. Tað er ólógligt at hyggja at myndum av kynsligum ágangi móti børnum, at hava tær í varðveitslu og at lata øðrum tær av trimum orsøkum.

Í fyrsta lagi er barnið fyri kynsligum ágangi undir myndatøkuni.
Í øðrum lagi er barnið aftur og aftur fyri ágangi, hvørja ferð myndirnar verða vístar, tí tað verður sýnt fram sum eitt kynsligt mál. Hetta er ágangur, ið barnið noyðist at liva við alt lívið.

Í triðja lagi skapar myndaútbreiðslan ein tørv á fleiri myndum, sum so aftur elvir til meira ágang ímóti børnum.

Heftið er eitt av fýra, ið ætlað eru bæði foreldrum og fakfólki.
Trý tey fyrstu heftini snúgva seg um umstøðurnar kring kynsligan ágang móti børnum. Hetta heftið er ætlað foreldrum ella fakfólki, ið vilja vita meira um filmar og myndir av ágangi móti børnum, um hvussu alt verður framleitt og breitt út, um hvat verður gjørt, og um hvat kann gerast í stríðnum ímóti ólógligu myndunum.

Red Barnet vónar, at hetta heftið kann stuðla vaksnum bæði privat og í arbeiðslívi í stríðnum at beina fyri myndum av ágangi móti børnum.

Kuno Sørensen
Sálarfrøðingur hjá Red Barnet





”

Hjá mær var barnaporno ein roynd at flýggja. Eg hevði ilt við at stýra vreiðini og angistini, eg kendi innan í mær, og við barnaporno hvarv eg inn í ein dreymaheim. Eg flýggjaði inn í kynsligu øsingina.

# Einaferð offur – altíð offur



Kynsligur ágangur er ein sálarligur skelkur og byrða fyri eitt barn, sum tí krevur viðgerð.

Við viðgerð kann barnið í ávísan mun leggja tilburðin aftur um bak og halda fram at mennast.

Kynsligur ágangur móti einum barni, ið er vorði avmyndaður ella sjónbandaður, er ein eyka byrða hjá barninum, tí í viðgerðini at leggja hendingina aftur um seg verður tað órógvað av vitanini um, at fólk kring allan heim síggja ágangin og verða kynsliga eggjað av tí.

Vandin fyri, at barnið verður kent aftur ella brádliga sær seg sjálvt, er ein byrða aftrat. Tí hevur tað týdning bæði at stríðast ímóti ágangi móti børnum og ímóti framleiðslu, útlutan og nýtslu av sjónbondum og myndum av áganginum.



Svøríki 2011: 23 kvinnur millum 37 og 70 ár verða dømdar í málum um barnaporno. Nógvar eru mammur ella ommur. Undir avhoyringunum vildu flestu kvinnurnar ikki kennast við myndirnar, men summar viðgingu, at tær vórðu kynsliga eggjaðar av teimum. Í próvtilfarinum vóru myndir, sum ein av kvinnunum hevði tikið av børnum, hon sjálv hevði samband við. Interpol metir, at kvinnuligir skemmarar vanliga bert umboða 1% av slíkum málum.

# Frá familjumyndum til sjónbond av grovum ágangi



## AT FLOKKA MYNDIR EFTIR INNIHALDI

Summi vaksin hava kynsligar tankar og dreymar um børn, og tí taka tey myndir av børnum, ella leita tey eftir myndum og sjónbondum. Myndirnar, sum hesi vaksnu framleiða og savna, avdúka, at næstan allar myndir av børnum kunnu stimbra kynsligar dreymar.

| FLOKKUR | MERKING | INNIHALD |
|---|---|---|
| 1 | Vanligar myndir | Vanligar myndir av barni, ið spælir í gerandisumhvørvi, ella myndir uttan erotiskar og kynsligar ábendingar, sum t.d. vísa barn í undirklæðum, svimjiklæðum ella tílíkum, t.d. familjumyndir. |
| 2 | Nektardyrkan | Myndir av naknum ella lutvíst naknum barni í støðu, har vanligt er at vera nakin, frá lógligum keldum. |
| 3 | Lúran | Myndir, ið tiknar eru í loyndum av barni á spæliplássi ella í øðrum barnaumhvørvi. Myndirnar vísa t.d. sjónlig undirklæði ella tey eru meiri og minni nakin. |
| 4 | Uppseting | Uppsettar myndir av heilt ella eitt sindur ílatnum ella naknum barni uttan kynsligar ábendingar, t.d. lýsingar. |
| 5 | Erotisk uppseting | Uppsettar myndir av heilt ella eitt sindur ílatnum ella naknum barni, ið er sett í erotiska ella kynsliga eggjandi støðu. |
| 6 | Eyðsýnd erotisk uppseting | Myndir við sjóneykuni á kynsgøgnini á heilt ella eitt sindur ílatnum ella naknum barni. |
| 7 | Eyðsýnt kynsligt samband | Myndir av kynsligari nerting, felags fleyging, egnari fleyging, munnsamlegu og samlegu millum børn uttan at vaksin eru við. |
| 8 | Ágangur | Myndir av kynsligum ágangi móti barni, sum vaksin fremja; tær vísa at kávað verður á kroppi. |
| 9 | Grovur ágangur | Myndir av grovum kynsligum ágangi móti barni, sum vaksin fremja, tær vísa kynsligt samband, samlegu, fleyging og munnsamlegu. |
| 10 | Harðskapur/ Samlega við djóri | A: Myndir av barni, ið verður bundið, sligið, pískað ella pínt á annan hátt. B: Myndir av einhvørjum kynsligum sambandi millum djór og barn. |





Allar myndir av børnum, ið vaksin við kynsligum dreymum um børn brúka, kunnu so statt vera ólógligar. Við at flokka myndirnar fáa vit tó sum samfelag eitt felags grundarlag fyri etiskum orðaskifti, ið kann áseta, nær myndirnar skemma barnið og harvið eiga at verða bannaðar.

Tað er so statt ógjørligt at banna øllum myndum, ið vaksin við kynsligum dreymum um børn nýta. At flokka myndirnar veitir tó grundarlag fyri einum etiskum samfelagsorðaskifti um, hvørjar myndir skulu metast sum ágangur móti børnum, og hvørjar myndir vit eiga at banna.

Í yvirliti niðanfyri eru ymisku myndaflokkarnir úr flokki 1 til 10 býttir eftir erotiskum ella kynsligum innihaldi. Yvirlitið fevnir um alt frá gerandismyndum av børnum til grovar og ógvusligar myndir við harðligum ágangi.

**FLOKKUR 1:** Hóast myndirnar ikki eru erotiskar ella pornografiskar, nýtir hin vaksni tær til skemmandi endamál við hugflognum sum amboði. Her er tað bert skipanin av myndunum hjá eigaranum, sum avdúkar, at tað er barnapornografi, ið býr undir savninum av barnamyndum.

**FLOKKUR 2:** Nektardyrkan umfatar myndir av barni í nektarmentan, t.d. myndarøðir frá nektarlegu ella øðrum virksemi, har børn eru nakin, tí tey hoyra til nektarfelagsskap. Myndirnar í flokki 2 eru ikki ætlaðar til at vekja kynsligar dreymar, men til ber ikki altíð at hava greiði á, hvørja ætlan myndatakarin hevði. Vaksin, ið hava kynsligan áhuga fyri børnum, kunnu nýta myndirnar til at dyrka kynsligar dreymar.

**FLOKKUR 3:** Kann umfata myndir, ið eru tiknar í loyndum á spæliplássi, við ein svimjihyl, á eini strond ella aðrastaðni, har børn halda til. Myndatakarin brúkar tíðum fjarlinsu til tess ikki at vekja ans. Tí er eisini trupult at fáa bilbugt við hesar myndir, tí tað varir ongan, at tær verða tiknar. At nýta slíkar myndir til at dyrka kynsligar dreymar og innlima tær í eitt kynsligt vaksnamannaumhvørvi er skemd.

**FLOKKAR 4 OG 5:** Børnini á myndunum eru møguliga vegleidd at standa, sita ella liggja á ein eggjandi hátt til tess at nøkta kynsligar vaksnamannalystir. Flokkur 4 og 5 umfatar eisini myndir, ið børn hava tikið av sær sjálvum í spæli, har tey royna seg sum fotomodell og rannsaka útsjónd og útstráling, sum síðan eru lagdar út á alnetið. Onkrar myndir eru truplari at flokka. T.d. klædnalýsingar av undirklæðum til børn, ið javnan hava ein farra av erotiskum ábendingum, hóast tær eiga at vera uttanveltaðar.

Eftir danskari lóggávu verða myndir í flokki 4 og 5 sjáldan mettar at vera ólógligar, men at útflyta og nýta myndirnar ólógliga er at gera seg inn á privatlívið hjá barninum.

**FLOKKAR 6-10:** Myndirnar í hesum flokkum eru ólógligar í Danmark. Sjóneykan er eyðsæð sett á umráðið kring kynsgøgnini og/ella á kynsligt samband t.d. fleyging, munnsamlegu, samlegu ella annað tílíkt.

Flokkur 10 umfatar grovastu myndirnar. Í teimum verður barnið kynsliga pínt ella noytt til kynsligt samband við djór.

Eg var bundin av barnaporno. Tað var ein vaksandi tørvur, ið fekk meg at taka meira og meira barnaporno niður á telduna.

## 150 SKULDSETINGAR UM ÁRIÐ

Í Danmark hava í miðal verið reistar 150 skuldsetingar um árið tey seinastu 10 árini ímóti persónum, ið hava havt tilfar – myndir ella sjónbond – av kynsligum ágangi móti børnum í varðveitslu og/ella breitt tað út. Talið av skuldsetingum gevur tó onga ábending um, hvussu nógv fólk brúka ólógliga tilfarið. Heldur er tað ein lýsing av, hvussu nógva orku løgreglan leggur í økið.

**Nú á døgum er tað ólógligt tilvitað at vitja og hyggja at heimasíðum við myndum av ágangi. Fyri juli í 2009 var tað ikki ólógligt, um tilfarið ikki varð goymt.**

## EIN ØRGRYNNA AV SKEMMANDI MYNDUM Í GRÁUM ØKI

Nógvar myndir liggja í flokki 1-5 í yvirlitinum á síðu 8. Serliga hava myndirnar í flokki 4 og 5 (uppsetingar) ábendingar um hugflog/dreymar hjá vaksnum og um eina uppseting av børnum sum erotisk og kynslig mál. At sýna børn fram sum eitt kynsligt mál er skemd. Summar heimasíður royna at fjala ónærisliga endamálið t.d. við at kalla myndirnar modellmyndir. Tó eru minst líka nógvar heimasíður, ið bart út avdúka endamál sítt bæði við lýsingum og viðmerkingum til myndirnar. Somuleiðis verða uppsettar myndir av børnum javnan vístar saman við lógligum pornografiskum myndum av vaksnum modellum fyri at leggja dent á endamálið.

**Heavenly Creatures – Little Asses on Little Lasses**
I am a pervert! I've known that for years, but I just can't help myself (and to tell the truth, I don't want to). If I was not meant to perv at little girls I'd not be attracted to them.
*(Tekstur frá heimasíðu við savni av erotiskt uppsettum myndum av gentum)*

Meira um myndir í gráa økinum kann lesast í greining av evninum á:
**www.redbarnet.dk/anmeld**



## SOLEIÐIS FLOKKAR DANSKA DÓMSVENJAN MYNDIR AV ÁGANGI MÓTI BØRNUM

**Flokkur 1:** Barnið er einsamalt á myndini, og einki kynsligt samband er við onnur, men sjóneykan er á kynsgøgnunum, og/ella fleyging ella onnur kynslig kávan er á myndini.

**Flokkur 2:** Tveir luttakarar (barn-barn ella barn-vaksin) í samlegu ella øðrum beinleiðis kynsligum sambandi. Harafturat myndir av einsamøllum barni, ið stingur fingrar ella annað inn í kynsop.

**Flokkur 3:** Groft kynsligt samband við barn við t.d. neyðtøku, tvingsli ella hóttan og kynsligt samband millum barn og djór. Harafturat allur kynsligur ágangur móti barni undir 3 ár.

**Barnaporno er eitt villleiðandi orð**
Bæði í Danmark og í restini av umheiminum verður roynt at minka um/broyta nýtsluna av orðinum barnaporno. Málsliga kann orðið benda á, at talan er um eitthvørt, ið er ætlað børnum eins og t.d. barnabøkur ella barnafilmar. Red Barnet heldur, at vit ístaðin eiga at vera greið og kalla tað „myndir av kynsligum ágangi móti børnum“.



LÓGIN

**§ 226.** [13] [3] Tann, sum tekur pornografiskar myndir, filmar ella tílíkt av persóni undir 18 ár við tí í hyggju at selja ella aðramáta breiða út tilfarið, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár.

Barnapornografi [3]

**§ 236.** [28] [5] [3] Tann, sum breiðir út pornografiskar myndir, filmar ella aðrar pornografiskar, visuellar endurgevingar ella tílíkt av persónum undir 18 ár, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 6 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru av øllum at rokna umstøður, har vandi er fyri lívinum hjá barninum, har ið grovur harðskapur verður nýttur, har barnið fær álvarsaman skaða, ella umstøður, har ið talan er um regluliga ella skipaða útbreiðslu.

Stk. 2. [3] Tann, sum eigur ella keypir ella gjøgnum internetið ella tílíka skipan til at breiða út upplýsingar útvegar sær atgongd til myndir, filmar ella aðrar pornografiskar, visuellar endurgevingar ella tílíkt av persónum undir 18 ár, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár.

Stk. 3. [13] [3] Ásetingin í stk. 2 er ikki galdandi fyri myndir, filmar ella tílíkt av persónum, sum hava fylt 15 ár, og sum geva samtykki til, at ein kann hava tilfarið í hondum. Samtykkið kann altíð takast aftur.

*www.logir.fo*

## ÁGANGUR MÓTI UPPSPUNNUM BØRNUM ER LÓGLIGUR

Danska revsilógin ásetur greitt, at talan skal vera um mynd av veruligum barni, áðrenn myndin er ólóglig. Tó kunnu talgildar ella á annan hátt framleiddar myndir og sjónbond eisini vera ólóglig, um tilfarið er so veruleikakent, at onkur kundi mistikið tað fyri at vera av veruligum barni. Undantikið hetta er alt annað listarliga framleitt tilfar av børnum í pornografiskum uppsetingum ikki ólógligt.

Grundgevingin fyri at loyva tekningum, málningum og søgum, sum t.d. hálova kynsligum sambandi millum børn og vaksin, er, at talan ikki er um ítøkilig børn, men um menniskjaligar dreymar.

Summi vilja vera við, at viðgerð av dreymum kann minka um vandan fyri, at teir verða útintir í veruleikanum. Onnur halda hinvegin, at dreymarnir kunnu eggja til veruligan ágang á verulig børn. Við støði í yrkisbókmentum metir Sexologisk Klinik á ríkissjúkrahúsinum ikki, at verandi gransking hevur prógvað nakað samband millum nýtslu av myndum av uppspunnum ágangi og ágang móti veruligum børnum.

”

Okkurt bagir mær. Ein og hvør hevði vitað, at tað var býtt. Eg veit ikki, hví eg gjørdi tað, men eingin varnaðist tað. Tað hevur alla tíðina nívt meg.

65 ára gamli maðurin úr Odense, ið er ákærdur fyri at hava kynsliga misnýtt tveir mánaða gamla abbabarn sítt, ásannar, at hann hevur sjónbandað ágangin ímóti egna abbabarni sínum og avnoktar ikki barnapornografisku myndirnar og sjónbondini, ið funnin eru í túsundatali m.a. á teldu hansara. Ágangurin móti abbabarninum fór fram, meðan mamman og pápin vóru til handils. Myndirnar vórðu síðan sendar til barnapornografiskar heimasíður, ið hann hevði samband við á alnetinum.
*(Kelda: www.fyens.dk)*

**Operation Hamlet**
„Gentan sat nakin og bakbundin á stólinum. Hon var eisini múlabundin, og beinini gleivaðu og vóru bundin í stólabeinini. Myndin var tøk á alnetinum hin 16. november. Aftan fyri gentuna sást maður í bláari blusu. Á blusuni var navnið á danskari fyritøku. Hetta var tað, ið feldi eitt altjóða pedofil-harkalið, ið býtti myndir út av víðgongdum, grovum barnaporno ímillum sín. Blusan hjálpti løgregluni at avdúka, hvør maðurin á myndini var.

…

Maðurin í blusuni var úr Tarm. Gentan á myndini var stjúkdóttir hansara – dóttir unnustu hansara. Gentan er 11 ár í dag (2013).

…

Síðan miðjan november hevur løgreglan í Ringkøbing undir loyniorðinum „Operation Hamlet“ staðið fyri at tæga sundur hetta pedofil-kervi. Atgerðin varð sett í verk, tá ið parið í Tarm varð handtikið.

…

Limirnir í pedofil-harkaliðnum bíløgdu myndir av ávísum ágangi beinleiðis hvør frá øðrum.“

*(Kelda: www.ekstrabladet.dk)*

# Avleiðingin av talgilding

## TALGILD FRAMLEIÐSLA ER SKELKANDI EINFØLD

Talgilding av myndum og sjónbondum hevur gjørt tað sera einfalt at framleiða dygdargóðar myndir og sjónbond – eisini hjá einstaklingum. So statt er tað vorðið bæði lætt og skjótt at leggja tilfar út á alnetið og aðrar talgildar samskiftismiðlar. Talgilding ger tað harafturat lætt at endurnýta eldri tilfar. Tað er ikki óvanligt at finna myndir og sjónbond, ið eru framleidd, áðrenn alt varð talgildað, og síðan eru skannað og send í umfar á alnetinum.

Sum við øðrum lógarbroti er talan her um einstaklingar, ið miðvíst royna at vinna pening ólógliga. Í hesum føri er tað ígjøgnum framleiðslu og útlutan av pornografiskum myndum av ágangi móti børnum. Framleiðslan av pornografiskum myndum av børnum er oftast sera væl úr hondum greidd. Í eini roynd at fáa tað at líkjast lógligum virksemi verður tilfarið javnan marknaðarført sum modellmyndir, myndlist ella undir heitinum „Tey sakleysu børnini“. Á heimasíðunum ber ofta til at keypa sær atgongd til fleiri myndarøðir, og tað gevur vanliga eisini atgongd til myndir við grovari kynsligum innihaldi.





Nógv framleiðsla er privat og fer fram í sambandi við kynsligan ágang t.d. í familjum, har ágangurin verður sjónbandaður. Undir áganginum kann barnið verða noytt at standa, sita ella liggja á eggjandi hátt. Við rættari uppseting kunnu myndirnar fáa tað at sýnast, sum børnini eru glað, og sum teimum dámar tað, og hetta ger tað léttari fyri brotsmannin at halda fast í ranghugsanini um, at børn ikki fáa skaða av áganginum, ella at tey sjálvboðin eru við.

## FELAGSSKAPURIN AFTAN FYRI MYNDIRNAR

At vera partur av felagsskapi við ólógligum myndum og at síggja børn sum kynslig mál er dragandi fyri summi. Tað kenst væl at vera í felagsskapi, har limirnir standa saman og hjálpa hvør øðrum. At felags áhugamálið er ólógligt kann styrkja samanhaldið uppaftur meira. Samstundis er eisini ein ørgrynna av brúkarum, ið leita og hyggja eftir myndum av ágangi móti børnum uttan at hava samband við nakran felagsskap.

”

Sum barn varð eg eisini fyri kynsligum ágangi, og tað havi eg ikki fingið viðgjørt. Tí fekk eg ein sjúkligan áhuga fyri barnaporno. Tað gav mær eina kenslu av felagsskapi.

## SAVNARASJÚKA

Tá ið løgreglan leggur hald á teldur, hevur tað tíðum víst seg, at gerningsmaðurin hevur savnað ovurstórar mongdir av myndum og sjónbondum. Vavið kann vera so stórt, at ilt er at ímynda sær, at hann hevur sæð ella kann hava sæð alt. Í slíkum førum hevur savnarasjúkan tikið yvir, og hon er so statt vorðin drívmegin, ið fær hann at halda fram.

## VANDIN VIÐ AT VÍSA SEG FRAM

Á sosialu miðlunum royna tey ungu tíðum at lýsa seg sjálv á ein frekan og eggjandi hátt við myndum, sum tey leggja út á egna vangamynd. Dømi eru eisini um ung, ið útluta nakinmyndir t.d. fyri at vátta eitt vinalag. Tílíkar myndir og/ella sjónbond kunnu eisini fara í umferð á alnetinum og enda inni á heimasíðum við hørðum pornografiskum tilfari. Myndirnar eru ikki tiknar í sambandi við ágang, men fyri tann unga kann tað kennast sum ágangur, um myndirnar brádliga eru tøkar á heimasíðu, ið eyðsæð er ætlað til pornografi.

## ATGONGD GJØGNUM LOYNILIG LEINKI

Myndir av kynsligum ágangi móti børnum stinga seg javnan upp á heimasíðum, tú av misgávum kanst klikkja teg inn á. Red Barnet, ið arbeiðir við at beina fyri slíkum myndum, staðfestir tó, at lívitíðin er stokkut hjá hesum heimasíðum, tí tær eru lættar at eyðmerkja, og tískil er tað skjótt, at netveitarin ella løgreglan steingir tær. Harafturímóti eru alsamt fleiri dømi um, at atgongd til ólógliga tilfarið bert fæst gjøgnum eitt ávíst leinki (t.d. www.download123/lix.in), ið møguliga krevur loyniorð og/ella gjald. Til ber ikki at finna innihaldið á ambætaranum við vanligari leiting á alnetinum, og tískil verður tilfarið útlutað, við at brúkarar annaðhvørt senda leinkið víðari ella leggja tað á eina heimasíðu, kjaksíðu ella tílíkt.

Endamálið við at nýta slíkar síður er lutvíst at avmarka almennu atgongdina til tilfarið og so statt gera tað truplari at avdúka, at síðurnar rúma sera stórum fílum, t.d. heilum filmum. So kann brúkarin, møguliga við gjaldi, skjótt taka tilfar niður. Fílubýtisforrit – eisini kallað peer to peer (P2P)-forrit – verða eisini brúkt nógvastaðni til at útluta ólógligar myndir og sjónbond av ágangi móti børnum.

**55.040 myndir**

„34 ára gamli dømdi maðurin hevði 55.040 myndir og 3.068 sjónbandabrot við barnaporno í ymiskum flokkum. Meginparturin var uppsettar myndir av naknum børnum. Tó fullu 19.372 myndir og 2.384 sjónbandabrot í sonevnda flokk 2 eftir danskari lóggávu við kynsligum virksemi; samlegu, munnsamlegu ella tílíkum. Eisini hevði hann 424 myndir og 32 sjónbandabrot í heilt grova flokki 3, við harðskapi, neyðtøku, bundnum børnum og tílíkum. Íalt vóru 289 gigabýt av barnapornografiskum tilfari á telduni hjá manninum, ið var tikið niður og lutað víðari.“ *(Kelda: www.sn.dk)*





# Hjálp ofrum – men eisini gerningsmonnum

## EINGIR SKEMMARAR ERU LÍKA

Ilt er at gera eina neyva lýsing av teimum, ið fremja ágang móti børnum, og sum hava áhuga fyri myndum og sjónbondum av áganginum. Meginparturin er menn, men eisini eru dømi um kvinnur, ið framleiða og savna myndir av ágangi. Summi lýsa seg sjálv sum pedofil, ið merkir, at teimum dámar betur kynsligt samband við børn enn við vaksin. Onnur hava ovurstóran áhuga fyri øllum kynslívi, og børn eru so statt bara eitt av mongum ymiskum kynsligum málum. Uppaftur onnur leita eftir áganginum, tí at tey sjálv hava verið fyri ágangi ella álvarsligari skemd sum børn, og summi leita bara eftir spenningi á netinum og verða síðan hugtikin og bundin av hesum heimi við myndum av ágangi móti børnum.

## VIÐGERÐARTILBOÐ FYRI SKEMMARAR Í DANMARK

Í almenna hugaheiminum verða tey, ið hyggja at myndum av ágangi, vanliga hildin at vera samvitskuleysir og harðvunnir brotsmenn, men rættarverkið og viðgerðarstovnar lýsa tey aloftast øðrvísi. Meirilutin verður lýstur sum fólk, ið eru komin í moralska tvístøðu og líða av samvitskubiti, skomm, skuldarkenslum, bundinskapi og vantandi tamarhaldi.

Nógv fakfólk bera tey saman við t.d. rúsdrekkamisnýtarar, ið avnokta, undirmeta og/ella fjala misnýtslu sína, men samstundis ikki megna at fáa tamarhald á henni. Hetta er eingin umbering, men tað kann slóða fyri hjálp og viðgerð.

Á Sexologisk Klinik á Ríkissjúkrahúsinum er dulnevnd telefonráðgeving við útbúnum kynslívsfrøðingum, ið hava royndir við at hjálpa fólki við kynsligum tonkum og dreymum um børn. Ráðgevingin hjálpir eisini við tilmelding til ókeypis viðgerð. Tað er ikki altíð gjørligt at verða grøddur fyri tankarnar, men til ber at læra at fáa tamarhald á teimum og harvið forða fyri, at teir verða annað enn bara tankar. Soleiðis kann ráðgevingin fyribyrgja møguligum kynsligum ágangi.

Les meira á:
**www.brydcirklen.dk**

brydcirklen.dk
**65 909 909**

# Hetta kanst tú gera

## MELDA MYNDIR Á TELDU

Hevur tú illgruna ella vitan um, at onkur hevur myndir av kynsligum ágangi móti børnum í varðveitslu, útlutar ella tekur slíkar myndir, skalt tú boða løgregluni frá. Talgilda tilfarið er týðandi próvtilfar, men tað er eisini lætt at strika av telduni. Tí er umráðandi, at viðkomandi, ið illgruni er um, ikki fær feril av fráboðanini og harvið møguleika at beina fyri virðismikla próvtilfarinum. Ólógligu myndirnar av ágangi fara tvørtur um landamørk, og tí er tað umráðandi, at løgreglan samstarvar og samskipar. Í Danmark er tað NC3, National Cyber Crime Center hjá ríkisløgregluni, ið samskipar innlendis og altjóða átøkini ímóti kt-lógarbroti. Á altjóða stigi samstarvar rískisløgreglan við EU Cybercrime Center hjá Europol og Interpol.

## MELDA ÓLÓGLIGAR HEIMASÍÐUR

Kemur tú fram á heimasíðu við myndum av kynsligum ágangi móti børnum, mæla vit til at melda heimasíðuna til Red Barnet á **www.redbarnet.dk/anmeld** skjótast gjørligt. Sum oftast liggja hesar heimasíður á ambætara uttan fyri Danmark. Alnetið er heimsfevnandi og átøk ímóti lógarbrotum verða í flestum førum sett í verk í landinum, har ambætarin er, sum myndirnar liggja á. Red Barnet sendir upplýsingarnar víðari til altjóða kervið INHOPE, og danska atgongdin til síðurnar verður avbyrgd.

**Melda heimasíður við ólógligum myndum av ágangi á heimasíðuni hjá Red Barnet: www.redbarnet.dk/anmeld**

STOP
DIGITALE OVERGREB NU
redbarnet.dk/anmeld

Síðan 2001 hevur **Red Barnet** verið limur í kervinum INHOPE, ið fær stuðul frá ES, og sum í 2015 hevði opið telefonsamband í 45 londum kring heimin. Kervið hevur til endamáls at beina fyri myndum av ágangi móti børnum í tøttum samstarvi við netveitarar og løgreglu. Fráboðanir fáast gjøgnum telefon og verða sendar víðari til myndugleikarnar í landinum, har ólógliga tilfarið er staðfest. Løgreglan og netveitarin kunnu síðan samstarva um at beina fyri tilfarinum og rættarsøkja einstaklingarnar, sum hava tilfarið um hendur.

Les meira her: **www.inhope.org**

INTERNATIONAL ASSOCIATION OF INTERNET HOTLINES
INHOPE

## TALGILT SAMSTARV Í DANMARK

Síðani 2005 hava ríkisløgreglan, danskir netveitarar og Red Barnet samstarvað um at avbyrgja útlendskar heimasíður við ólógligum myndum av kynsligum ágangi móti børnum. Ein roynd at fáa atgongd til tílíka síðu letur eina sjálvvirkandi upplýsingarsíðu upp, ið boðar frá, at tilfarið, ið leitað verður eftir, er ólógligt, og samstundis upplýsir síðan um ráðgevingarsíðuna brydcirklen.dk.

Nógvar ólógligar heimasíður verða fyribeindar og rannsakaðar gjøgnum altjóða samstarvið millum INHOPE og løgregluna í londunum, har tilfarið er goymt. Á danska listanum eru umleið 3000 heimasíður. Leinkini verða verandi á listanum í seks mánaðir, hóast tey eru óvirkin. Soleiðis verða brúkarar, ið leita sær til síðurnar gjøgnum gomul leinki á t.d. kjaksíðum, gjørdir varugir við, at slík leitan á netinum er ólóglig.

Heimasíður við bústaði í Danmark verða ikki stongdar, men danska løgreglan rannsakar tær. Á www.politi.dk kanst tú kanna, um netveitari tín er við í skipanini. Við leitiorðinum „børneporno“ fært tú eina ávísing til síðuna „Blokerer din udbyder børneporno?“

## TALGILT FINGRAMERKI HJÁLPIR LØGREGLUNI

Tá ið løgreglan leggur hald á teldur ella harðdiskar, verða tey rannsakað fyri próvtilfar. Til ber at gera eitt talgilt fingramerki av ólógligu myndunum, ið løgreglan hevur kunnleika til, og síðan goyma fingramerkini í einum dátugrunni.

Eitt serligt forrit, ið kennir myndir aftur, styttir síðan uppgávuna at gjøgnumganga tilfarið við at skilja áður sæddar myndir frá. Tað er ikki óvanligt at finna fleiri túsund ólógligar myndir á inndrignu teldunum.

## ÓLÓGLIGAR MYNDIR Á ARBEIÐSPLÁSSINUM

Kt-skipanin á arbeiðsplássum verður eisini stundum nýtt til at goyma ella útluta ólógligar myndir av ágangi. Fyritøkan NetClean hevur ment forritið ProActive, ið kann leggjast inn í kt-skipanina á arbeiðsplássinum. Forritið boðar frá, um starvsfólk leita eftir ólógligum myndum, ið líkjast teimum í dátugrunninum.

Við støði í royndum frá fyritøkum, ið brúka ProActiv, metir NetClean, at umleið eitt av túsund starvsfólkum brúkar kt-skipanina á arbeiðsplássinum til at goyma ella senda myndir av ágangi móti børnum. Les meira her: www.netclean.com

**Heimasíðurnar verða stongdar til tess at:**

- Darva atgongdini til heimasíður við myndum av ágangi móti børnum.
- Upplýsa um, at tað er ólógligt tilvitað at vitja tílíkar síður.
- Vísa, at løgreglan eisini hevur eftirlit við netinum.
- Kunna um ráðgeving og viðgerðarmøguleikar
- Kunna um samfelagsligu ábyrgd veitarans.

**Hjálp til arbeiðspláss**

Red Barnet, danska løgreglan og Dansk Industri hava í felag gjørt eina vegleiðing til arbeiðspláss, ið avdúka myndir av kynsligum ágangi móti børnum. Í henni verður t.d. vegleitt um, hvat ið er at gera, um eitt starvsfólk – tilvitað ella ei – letur upp eina ólógliga heimasíðu við myndum av kynsligum ágangi móti børnum, og um ólógligar myndir verða funnar hjá einum starvsfelaga ella á einum felags dreivi.

Vegleiðingin fæst her: **www.redbarnet.dk/anmeld**

## HER KANST TÚ FÁA HJÁLP OG RÁÐGEVING Í FØROYUM

**BARNABATI:** tlf. 522011 & 532011 • www.barnabati.fo

**BARNAVERNDARSTOVA FØROYA:** tlf. 302480 • bvs@bvs.fo • www.bvs.fo

**BARNAVERNDARTÆNASTAN Í TÍNUM ØKI** • sí yvirlit á www.bvs.fo

**BUM – BARNANNA UMBOÐSMAÐUR:** tlf. 358500 • www.bum@bum.fo • www.bum.fo

**GIGNI:** tlf. 562300 • gigni@gigni.fo • www.gigni.fo

**KOMMUNULÆKNIN Í TÍNUM ØKI** • sí yvirlit á www.@heilsutrygd.fo

**KRIS:** tlf. 448181 • kris@kris.fo • www.kris.fo

**KVINNUHÚSIÐ:** tlf. 317200 • post@kvinnuhusid.fo • www.kvinnuhusid.fo

**LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, PSYKIATRISKI DEPILIN:** tlf. 304500 • ls@ls.fo • www.ls.fo

**LØGREGLAN:** tlf. 351448 • politi@politi.fo

**RÆTTARHJÁLP FØROYA:** tlf. 319823 • post@raettarhjalpin.fo • www.raettarhjalpin.fo

**SERNÁM:** tlf. 360200 • sernam@sernam.fo • www.sernam.fo

KRIS | RÁÐGEVING FYRI SEKSUELT MISBRÚKT

Red Barnet